# Tryggjaður og tryggur av landinum

Tryggingarfelagið Føroyar vónar, at øll fara at fáa eina góða summarfrítíð, og at tey, sum fara út at ferðast fáa eina góða ferð. Ein fortreyt fyri eini góðari uttanlandsferð, er at hava rætta ferðatrygging.




Tryggingarfelagið Føroyar kann av royndum siga, at ein ferðatrygging er eins týdningarmikil og ferðaseðil, pass, pengar og annað, vit hava við okkum á slíkum ferðum.

Um tú verður sjúkur, fært skaða ella á annan hátt hevur brúk fyri bráðfeingishjálp, er trygging neyðug, skalt tú ikki sjálvur fáa stórar útreiðslur, um óhappið hendir.

Tryggingarfelagið Føroyar hevur altíð eina ferðatrygging, ið hóskar til tín tørv, og starvsfólkini eru til reiðar at hjálpa og vegleiða, so tú kanst kenna teg tryggan á ferðini við júst tí røttu ferðatryggingini.

Tað er altíð hent at kanna eftir, hvørja trygging tú møguliga hevur frammanundan, tí tað kann vera, at onnur trygging hóskar betur til tann tørv, tú hevur.

Um tú ferðast í Norðurlondum, Bretlandi, Europa ella í heiminum annars, eru tryggingarnar ymiskar. Tí er umráðandi, at tryggingin fevnir um júst tað landafrøðiliga økið, tú skalt vitja.

Verður farið av landinum í vinnuligum ørindum, er tín privata ferðatrygging ikki galdandi, og tá má teknast serstøk ferðatrygging.

Skuldi ferðin av ávísum orsøkum verið av ongum, áðrenn tú fert avstað, er umráðandi at hava eina avlýsingartrygging, sum rindar endurgjald fyri ferðakostnaðin.

Øll tíni tryggingarviðurskifti í sambandi við uttanlandsferð kanst tú avgreiða á ferðaskrivstovunum ella onkrari av deildunum hjá Tryggingarfelagnum Føroyum.

Ella sagt við øðrum orðum: Ein og hvør góð ferð byrjar hjá Tryggingarfelagnum Føroyum!




















